## DAGSINS MEINING

# Eitt viðkomandi mál

Tað má ásannast, at spurningurin um avleiðingarnar fyri Føroyar og um avleiðingarnar fyri ríkisfelagskapin av nýggju ES grundlógini er ein viðkomandi spurningur. Tað er tí skilagott av Norðatlantsbókinum at reisa hendan spurning. Hetta er avgjørt eitt mál, ið hevur almennan áhuga í Føroyum. ES grundlógin uttan mun til hvørja lagnu, ið hon fær, má hava nakrar viðfevndar avleiðingar, tí talan er um ein sáttmála, ið røkkur langt inn á suverenitetin hjá øllum limalondum.

Ein kan siga, at tað í grundinier spell, at fólkatingið ikki tók hesa avbjóðingina upp. Hinvegin kann tað eisini vera nakað um sjónarmiðið hjá fyrreverandi løgmanni um, at hetta mál meira hoyrir heima á løgtingi enn á fólkatingi. Spurninguirn er eisini, um ikki hetta mál júst hevði verið í betri hondum á løgtingi enn á fólkatingi. Men vit halda, at tað er skeivt at lasta Norðatlantsbólkin fyri at hava tikið hetta mál upp. Bólkurin arbeiðir á sínum øki,sum er fólkatingið og tað er einki at finnast at.

Hinvegin er málið fallið, men tað eigur ikki at detta burtur úr almenna orðaskiftinum fyri tí. Landsstýrið eigur tí at taka stig til, at tann kanning, sum talan hevur verið um, verður framd. Løgtingið eigur at seta pengar av og landsstýrið eigur at seta kanningina í verk. Tað ber til at finna ein bólk av føroyskum og útlendskum serfrøðingum at gera hetta arbeiðið. Hesum eiga allir partar at vera áhugaðaðir í -andstøða eins væl og samgonga. Tað ber ikki til í einum fólkaræði at forkasta alt, sum andstøðan kemur við. Takið tí málið upp, har tað hoyrir heima, nevniliga her á landi.

**Sosialurin**

# Natusan og børn

BRÚKARASAMTAKIÐ

Natusan verður nú næstan dagliga viðgjørt av brúkararáðunum í grannalondunum, men sær hetta ikki út til at rína við hjá SCA Hygiene Products, ið stendur fyri marknaðarføring av Natusan um okkara leiðir.

Til pinkubørnini bjóða tey papírsklútar at vaska endan við undir navninum Natusan Baby Wipes. "Reint sum tað reinasta vatn" siga tey sjálvi. Alt er skjalprógvað, men tað er ikki tøkt fyri almenninginum, sigur kunningarstjórin í SCA Hygiene Products A/S, Ulla Rode.

Sannleikin vísur seg at liggja nakað burturi frá tí, ið SCA Hygiene Products boðar frá. Klútarnir innihalda nevnliga parabenir, ið eru undir illgruna fyri at órógva hormonini.

Júst somu hálovandi orð verða brúkt í marknaðarføringini av Natusan Baby Top-To-Toe Wash, hóast sápan inniheldur bæði parabenir og parfumu.

Afturat tí skaðiliga áríninum á børnini, vísa fleiri umhvørvisfelagsskapir á, at evnini eisini eru skaðilig fyri náttúruna. Eitt nú hevur norski umhvørvisfelagsskapurin Grønn Hverdag (www.gronnhverdag.no), og danski brúkarafelagsskapurin Danmarks Aktive Forbrugere (www.aktiveforbrugere.dk) leingi ført eina miðvísa herferð ímóti fleiri Natusanvørum frá SCA Hygiene Products.

Danska Brúkararáðið (www.forbrugerraadet.dk) hevur melda SCA Hygiene Products til donsku umhvørvismyndugleikarnar fyri villeiðandi marknaðarføring.

Trupulleikin við tí marknaðarføringarhátti, ið verður brúktur um Natusan er, at vøran verður lýst sum sera rein og náttúrlig, og tí gevur eina mynd av, at vøran mestan er góð fyri barnið at nýta. Hetta er eisini tað, ið tey flestu foreldur hugsa. Men bara við at hyggja at vørulýsingini, sæst ein annar sannleiki.

Afturat hesum vísur ein kanning hjá danska brúkarablaðnum Tænk (www.taenk.dk), at teir vátu papírsklútarnir innihalda 57 ymiskar heilsuskaðiligar evnafrøðiligar samansetingar. Millum annað Idoproponyl Butylcarbamate (IBC). Hetta evnið er til dømis ikki loyvt at nýta í varrastift, tí varrarnar tola tað ikki. Ella Butylparaben, sum er skrásett sum sera vandamikið fyri umhvørvið.

### Natusan Kids

Seinasta nýggja frá SCA Hygiene Products er Natusan Kids. Ein røð av litríkum dunkum við alskins sløgum av smílandi fruktum. Eisini ein marknaðarføring, ið lættliga villeiðir foreldur til at hugsa, at vøran einans er gjørd úr tí besta, ið náttúran kann bjóða.

Aftur her er málbólkurin tey smæstu, og aftur her leggur SCA Hygiene Products líka í, hvørji skaðilig evni verða blandaði í sápuna. Millum annað Parabenir, litevni, parfuma og ymisk haldevni, ið kunnu elva til ovurviðkvæmi.

Kortini breggja tey sær í marknaðarføringini av tí skjalprógvaða mildni, ið vøran stendur fyri. Hetta er tí fallið mongum fyri bróstið, og í Svøríki hevur Svenska Naturskyddsföreningen (www.snf.se) melda SCA Hygiene Products fyri villeiðandi marknaðarføring, meðan Danmarks Aktive Forbrugere hevur gjørt tað sama í Danmark.

Á føðideildum í Danmark og Norra hevur í langa tíð verið vanligt at bjóða teimum nýggju mammunum ymiskar vørur frá Natusan. Men í Norra siga jarðamøðurnar nú stopp. Serliga tí at SCA Hygiene Products heldur seg langt burturi frá øllum heilsu og umhvørvis merkingum. Ístaðin vilja tær hava Svanemerkta merkið Babyline frá donsku fyritøkuni Derma Pharm.

Í Føroyum fáa nýklæktu mammurnar ein pakka frá apotekinum. Har lova tey, at pakkin inniheldur hvørki Natusan, luktilsi ella parabenir.

Stóru handilsketurnar Coop og Matas standa fyri einum stórum parti av søluni av Natusan. Væl vitandi um vandan, ið okkara smæstu verða sett í, vilja tey ikki taka vørurnar av hyllunum. Tó hevur Coop lagt trýst á SCA Hygiene Products um at finna onnur evni ístaðin fyri tey skaðiligu, meðan Matas hevur heitt á tey um at fáa vørurnar til børn Svanamerktar. Svanamerkið, ið er eitt norðurlendskt góðskumerki, veitir trygd fyri, at vøran er framleidd so rein og umhvørvisgóð sum møguligt.

Men SCA Hygiene Products staðfestir, at ongar ætlanir eru um at broyta samansetingina í vørum til børn. Hetta hava tey eisini loyvi til, tí eingin lóg bannar ávísum evnum til henda málbólk. Hetta hóast evnini eyðsæð gera nógv størri skaða á børn enn vaksin.

Sosialurin

Lesið Sosialin - so eru tit við

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.